# Ung fáa pensjón

Støðugt fleiri danir fáa fyritíðarpensjón á ungum árum. Tey seinastu hagtølini vísa, at í fjør fingu 1.358 fólk í aldrinum 19 til 29 ár tilsøgn um fyritíðarpensjón. Tað talið er 29 prosent størri enn í 2006. Hagtølini vísa, at sálarligar líðingar eru tann vanliga orsøkin til, at fólk fáa fyritíðarpensjón, áðrenn tey hava fylt 30. Men tað er ikki vist, at sálarligar líðingar eru varandi, og tí hevur tað verið frammi at broyta skipanina, soleiðis at fólk kunnu fáa fyritíðarpensjón í avmarkaða tíð fyrst. Fleiri politiskir flokkar taka undir við hugskotinum, og teir fara at viðgera tað í summar, sigur DR.



# Lýkka hóttir kópaveiðina

Veturin hevur verið óvanliga lýggjur í Kanada, og tað hevur millum annað havt við sær, at næstan eingin ísur hevur verið í St. Lawrence-flógvanum. Tað kann bjarga nógvum túsund kópum, tí tann ísurin, sum er í flógvanum, er so tunnur, at veiðimenn kunnu ikki fara út á hann. Kanadiskir veiðimenn plaga at veiða umleið 300.000 kópar í mars, men í ár verður tann siðbundna veiðan kanska av ongum, sigur CBC News. Kanadiski fiskimálaráðharrin, Gail Shea, sigur, at ísurin í St. Lawrence-flógvanum hevur ikki verið so tunnur tey seinastu 70 árini.

# Meistarin og lærlingurin

**Málararnir Steinbjørn Zachariasen og Martin í Nesi hava havt eitt langt málararív saman. Martin byrjaði hjá Steinbjørn og Steinbjørn endaði hjá Martini**

MÁLARALÍV

*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*



*Steinbjørn Zachariasen, vm, og Martin í Nesi leggja síðstu hond á Hvalbiar Kirkju. Aftanfyri teir hómast sermerkti bordin í altarinum*

Málararnir báðir Martin í Nesi og Steinbjørn Zachariasen hava havt eina langa søgu saman.

Tað er ein søga, sum byrjaði fyri 40 árum síðani og sum akkurát nú er endað.

Søgan byrjaði, tá ið Martin í Nesi fór í læru hjá Steinbirni og har varð hann verandi í samfull 20 ár.

Men nú tíðin var komin til at Steinbjørn ætlar at leggja frá sær fyri aldur, endaði hann sína yrkisleið sum málari hjá sínum gamla lærlingi, Martini í Nesi.

## Mestsum av tilvild

Martin í Nesi sigur, at tað var mestsum av tilvild, at hann 18 ára gamal fór í málaralæru hjá Steinbirni Zachariasen tann 25. mai í 1970.

– Eg hevði spurt Arnbjørn Mouritsen um eg kundi sleppa í málaralæru hjá honum, men tað bar ikki til, tí hann var í veruleikanum ikki málari, men bakari, sum bara var farin at mála sigur Martin í Nesi.

Men so sá Martin eina lýsing í bløðunum, har Steinbjørn søkti eftir lærlingi og hann søkti og fekk læruplássið.

Tá hevði Steinbjørn bara verið málari í eitt ár og Martin var fyrsti lærlingur, sum hann tók og hevði í læru øll fýra árini. Annars hevði hann tveir lærlingar, men teir hevði hann yvirtikið frá einum øðrum meistara og skuldu bara gera læruna lidna.

Steinbjørn letur sera væl at Martini, sum lærlingi.

Eg havi havt tríggjar lærlingar úr Hvalba, Martin í Nesi, Heina Holm og Óla Jensen og teir hava hvør verið raskari og dugnaligari enn annar.

– Hjá teimum var ongantíð neyðugt at fara aftur um aftur.

Ætlanin var bara at fáa sveinabrævið, so skuldi Martin fara suðuraftur at arbeiða.

Men mongum brestur ætlan og tað gjørdi tað eisini hesuferð.

Martin og Steinbjørn svingaðu so mikið væl saman, at Martin varð verandi hjá honum í samfull 20 ár, áðrenn hann flutti til Suðuroyar aftur og byrjaði fyri seg sjálvan í mars í 1990.

Men hóast teir báðir ikki hava arbeitt saman, hava teir alla tíðina havt gott samband og hava átikið sær ymsar uppgávur í felag. Og hevur annar havt brúk fyri hjálp, hevur verið heitt á hin og tað hevur riggað væl.

## Løgdu vatn í Stakkin

Martin og Steinbjørn gjørdust rættiliga væl og høvdu nógv saman, eisini uttanfyri arbeiðstíð.

Soleiðis var Martin og hjálpti Steinbirni, tá ið hann bygdi og teir vóru eisini mangan og dyrgdu og skutu fugl.

– Tá hevði mann tíð til slíkt, men nú hevur ongin tíð til nakað, sigur Steinbjørn.

Teir vóru eisini onkur ár í Stakkinum í Tjørnuvík og fleygaðu.

– Tað vóru eisini vit báðir, sum saman við Albert Hansen, løgdu vatn út í húsið í Stakkinum, fortelja Martin og Steinbjørn.

Tá varð ansað væl eftir, hvør slapp í Stakkin at fleyga. Men teir báðir høvdu so fingið loyvi at fara í Stakkin at fleyga.

– Vit funnu so upp á, at vit skuldu leggja vatn út í húsið í Stakkinum og sum sagt, so gjørt og soleiðis fingu tey vatn út í Stakkin.

Annars var tað óhandugt og tungt at dragsa dunkar við vatni við sær.

## Fimm tons av máling

Men sum málarar hava teir eisini havt nógvar uppgávur. Og ein tann størsta uppgávan, teir báðir hava havt í felag, hevur verið at mála Norrønu mestsum alla sum hon var bæði innan og uttan.

Martin hevði ikki verið sjálvstøðugur meiri enn einar tveir mánaðir, tá ið Steinbjørn fyrstu ferð sendi boð eftir honum at hjálpa honum at mála Norrønu.

Tað var Uni Zachariasen, sum hevði arbeiði, men hann fekk so fleiri afturat sær og Steinbjørn fekk so eisini Martin við.

Teir málaðu Nørrunu í fleiri umførum.

Fyrstu ferðina var í 1990 og tá brúktu teir heili fimm tons av máling til at mála hana við - og hetta var bara uttan, heilt frá sjónum upp í skorsteinin.

Teir vóru 14 mans um arbeiðið og teir brúktu 11 dagar um at smyrja tey fimm tonsini av máling upp á Norrønu, so skilligt er, at tað vóru drúgvir dagar.

- Tað var stórarbeiði og teir dagarnar var onki gjørt uttan at arbeiða, sova og eta.

Arbeiðið skuldi vera liðugt eina ávísa tíð, men teir vóru so óvanir við slíkt arbeiði, at teir dugdu ikki so væl at meta um tíðina. Sostatt díktu teir á fyri heldur at hava nakað at geva av í síðsta enda.

## Endaði hjá Martin

Nú hevur Steinbjørn Zachariasen lagt pensilin, tí hann ætlar at gevast.

Men so fekk Martin í Nesi litið upp í hendurnar at mála kirkjuna í Hvalba innan og tað var so mikið stórt arbeiðið, at hann heitti á Steinbjørn um at hjálpa til og tað stóð ikki á.

Men hetta verður nokk eitt tað seinasta, Steinbjørn málar. Sonur hansara, Magnus, er eisini málari og tað, Steinbjørn málar hereftir, verður bara at rætta soninum eina hjálpandi hond, tá ið umstøðurnar og hugurin talar fyri tí.

Tað seinasta, Martin í Nesi og Steinbjørn Zachariasen hava verið saman um, er at mála kirkjuna í Hvalba.

Og teir báðir hava fingið tað skoðsmál, at hetta er handverk á allarhægsta støði.

So væl, sum tað hevur borið til, hava teir málað kirkjuna soleiðis sum hon sá út fyrr.

- Tað eru minst fimm ár síðani eg fór at leita eftir myndum av kirkjuni fyri at kunna fáa litirnar og bordarnar fram afturat. Tað eydnaðist eftir mikið leitingararbeiðið at finna eina mynd, sum Leivur Nygaard síðani skannaði og størkaði og gjørdi skabelónir eftir.

- Tað eydnaðist kortini ikki at finna mynd av bordanum á prædikustólinum, so hann hevur áðurnevndi Leivur Nygaard, teknað.

Súlurnar eru lagdar við blaðgulli og tað hevur Steinbjørn gjørt tað mesta.

## Stór afturgongd

Annars halda teir báðir, at málarafakið hevur verið fyri stórari afturgongd hendan seinasta mansaldurin.

– Nú gongur hvør Hanus og Janus við pensli í hond, uttan at hugsa um handverkið.

Fyrr var alt træverk grundað við oljumáling, síðani fullspartlað og málað fýra ferðir. Nú er viðurin viðgjørdur fyri rotið og so verður máling bara klínd útyvir.

- Eg ivist eisini í um teir yngru málararnir yvirhøvur duga at tapesera. Tað kunnu teir ikki hava lært, tí ongin brúkar tað longur, heldur Steinbjørn fyri.

- Nú er ikki so frægt sum varmi komin á, so verður skundað undir málararnar at fáa teir inn. Fyrr var ikki hugsingur um hjá einum málara at fara til verka, fyrrenn húsini høvdu staðið púra liðug í einar tveir mánaðir.

- Ein feilur er eisini, at nú skal alt ganga so skjótt og tað skal helst onki kosta, halda teir báðir.